# Nú verða aftur grundøki at fáa í Kollafirði

**Tórshavnar Kommuna hevur lagt fram eina nýggja ætlan fyri Kollafjørð. Øki verða sett av til sethús og til eitt miðstaðarøki**

SETHÚS
*Snorri Brend*

**Kollafjørður:** Nú skal aftur verða møguligt at fáa grundøki til keyps í Kollafirði.

Í mong ár hevur høvuðsstaðurin stríðst við at útvega grundøki til øll tey mongu, sum ynsktu og ynskja at seta búgva her.

Men í Kollafirði hevur støðan eisini verið hon, at trupult hevur verið at útvega nóg nógv grundøki til eftirspurningin.

Hetta hevur Tórshavnar kommuna nú sett sær fyri at finna eina loysn uppá. Og á býráðsfundi hóskvøldið var eitt mál um broytingar í byggisamtyktini í Kollafirði til viðgerð.

Hetta málið varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

### Tørvur

Tað hevur leingi verið tørvur á grundøkjum í Kollafirði, tí eftirspurningurin hevur verið so stórur.

Nú hevur kommunan so gjørt ein býarplan fyri Kollafjørð, har ein í fyrsta lagi fær eini 70 grundøki til sethús. Ætlanin er eisini at útvega sær øki til framtíðar menning av bygdini.

Neyðugt hevur verið at broytt byggisamtyktina fyri bygdina, har tað í fyrstu syftu snýr seg um grundøki og í øðrum lagi eisini til miðstaðarbygging.

Í samband við málið vóru komin inn trý mótmæli frá borgarnum í Kollafirði, sum m.a. mótmæla broytingunum av økjum – m.a. at eitt ávíst øki, sum varð nýtt til landbúnað skuldi broytast til eitt alment frílendi, og eitt annað, har mótmælt verður at eitt landbúnaðarøki verður broytt til alment endamál.

Alt málið hevur eisini verið til ummælis í tí serstøku Kollfjarðarnevndini, sum hevur tikið undir við ætlanini.

Øll hesi mótmælini hava verið viðgjørd í nevndunum, men semja er kortini um at halda fast við tær ætlaðu broytingarnar.

Og á býráðsfundi hóskvøldið varð so samtykt at fara undir hesa ætlanina.




*Býarplanur fyri Kollafjørð er nú gjørdur, og nú verður aftur høvi at ogna sær grundøki í bygdini. Borgarstjórin, Heðin Mortensen fegnast um, at tað nú aftur verður gjørligt at útvega sær grundøki í Kollafirði*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tey eldru á val til Eldraráðið

**Eftir at hava arbeitt við ætlanini í eina tíð er nú greitt, at Eldraráðið í Havn skal mannast. Atkvøðugreiðslan endar seinast í november mánaði**

ALDUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Í næstum fer eitt heldur øðrvísi val at fara fram í Havnini.

Veljast skal eitt serstakt Eldraráð við fimm limum, sum allir borgarar í Havnini omanfyri 60 ár skulu atkvøða um.

Valið verður skipað við brævatkvøðum, sum skulu verða kommununi í hendi innan 29. november.

Tá er ætlanin at allar atkvøðurnar skulu teljast upp í Snarskivuni henda dagin. Og síðani verður kunngjørt, hvørji teir fyrstu limirnir í hesum ráðnum verða.

Tað verður sosiala nevndin hjá býráðnum sum skipar fyri hesum valinum, bæði hvat viðvíkur uppteljingini og við sjálvum valinum.

### Ráðgevarar

Endamálið við hesum eldraráðnum er at ráðgeva býráðnum í øllum málum sum hava við tey eldru at gera.

Ráðið skal eisini koma við hugskotum og annars virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

Eldraráðið kann tí eisini úttala seg um eitthvørt evni, sum hevur áhuga hjá teimum gomlu, og her koma við hugskotum og uppskotum.

Somuleiðis verður gjørligt at seta spurningar til býráðið um eldrapolitikkin og í sambandi við fíggjarætlanina.

Annars verur skipað fyri serstakari ráðstevnu fyri tey eldru í Norðurlandahúsinum hósdagin 6. oktober.

Her verða viðurskifti hjá teimum eldru her og í øðrum londum lýst, - m.a. eisini tá talan er um tey serstøku Eldraráðini.



*Tey eldru í Havnfáa nú møguleika at velja sítt egna ráð*
*(Tilvildarlig mynd)*

